# HUGNA, PPINGUM






*Kørini við fiskum og skeljum á Stangarbrúnni hava stóran áhuga, bæði millum børn og vaksin*

Mynd: Dávur Winther

Innleiðandi umfar í spurnarkappingini, SkipaQuizzin, verður eisini fyrrapartin leygardagin, eins og føroyameistarakapping verður í eplaflising, har menn og kvinnur í øllum aldri kunnu luttaka.

## Kappingardagurin

Leygardagurin er annars hin stóri kappingardagurin á Føroya Sjómannadegi.

Men áðrenn kappingarnar byrja klokkan 14, verður stór móttøka klokkan 13 fyri Livari Nysted og Leven Brown, sum við bátinum Atemis Investment settu heimsmet við at rógva tvørtur um Atlantshavið. Teir koma báðir rógvandi inn eftir vánni heim móti økinum við stórapall, har báturin verður drigin.

Sjómannadagurin fer at heiðra Livar og Leven á stóra pallinum, og síðan verður høvi at síggja heimskenda bátin.

Saman fara Atemis Investment, báturin Diana Victoria og Rospiggen at standa á Stangarbrúnni, har høvi eisini verður at heilsa upp á Livar og Leven.

Heilt frá klokkan 14 og til klokkan 19 leygardagin verða tær nógvu og ymisku kappingarnar, sum byrja við trolbøting og enda við føroyameistarakapping í egning.

Leygarkvøldið klokkan 20.30 verður stór heiðurskonsert við Hanusi G. Johansen í Badmintonhøllini, og eftir konsertina verður dansur við Showmenn.

vilmund@sosialurin.fo




*Havrannsóknarskipið Magnus Heinason fer aftur í ár at liggja við bryggju í Klaksvík á Føroya Sjómannadegi*

Mynd: Dávur Winther

# Nógvar framsýningar á sjómannadegnum

**Millum mongu framsýningarnar á sjómannadegnum, verður aftur í ár høvi at vitja umborð á havrannsóknarskipinum, Magnusi Heinasyni, har eitt nú áhugaverd filmsbrot verða víst**

Vilmund Jacobsen

Havrannsóknarskipið Magnus Heinason fer aftur í ár at liggja við bryggju í Klaksvík á sjómannadegnum. Umborð á skipinum fara fólk at greiða frá virkseminum hjá Havstovuni og ymiskum rannsóknum. Høvi verður soleiðis at vitja umborð á Magnusi Heinasyni millum klokkan 12 og 18 leygardagin, sjálvan Føroya Sjómannadag.

Kunnað verður um, hvussu úrslit verða fingin til vega, eins og greitt verður frá teimum nýggjastu fyribilsúrslitunum av yvirlitstrolingunum, sum nú verða gjørdar.

Umborð á Magnusi Heinasyni fer Havstovan at vísa forvitnislig filmsbrot, ymisk fiskasløg, víst verður á magakanningar sum lýsa, hvat fiskur etur, ymisk útgerð verður víst fram, eins og kunnað verður um nýggja havrannsóknarskipið, sum ætlanin er at byggja.

## Aðrar framsýningar

Men tað verða eisini aðrar framsýningar í Klaksvík í sambandi við sjómannadagin.

Eitt nú verður framsýning av gomlum bensinmotorum og gomlum viðfestimotorum – heilt frá 1932 og fram til fimmtiárini.

Jarn verður smíðað í gomlu essuni í Samsonar-Smiðjuni, og framsýning verður við fotomyndum sum lýsa grindarakstur og grindadráp.

Leygardagin fer Grindamannafelagið at vísa, hvussu hvalur verður skorin upp, og frásøgumaður fer at greiða frá, bæði á føroyskum og enskum.

Tveir grindahvalir frá grindini í Klaksvík verða soleiðis skornir upp á bryggjuni.

Leygardagin verður eisini framsýning við føroyskt sniðgivnum bundnum pløggum, og her er tað Norðoya Kunningarstova sum skipar fyri.

## Stórar felagsmyndir

Aðrastaðni í hesum blaði verður kunnað um línuskipini Jákup B og Klakk, sum sjómannadagurin fer at heiðra, nú fimmti ár eru liðin, síðan tey komu til bygdar.

Seinnapartin leygardagin verða felagsmyndir tiknar á bryggjuni av øllum teimum, sum hava siglt við hesum báðum skipum seinastu fimmti árini.

vilmund@sosialurin.fo